# Ein annar heimur

*Minnini úr Føroyum undir filmsupptøkunum eru ógloymandi, sigur 85 ára gamli Douglas Fisher, sum í sekstiárunum gjørdi tríggjar dokumentarfilmar um Føroyar. Tann eini, sum henda myndir er tikin frá, verður vístur í Miðlahúsinum á ólavsøku*

**– Filmsupptøkurnar í Føroyum í sekstiárunum, tá menn fóru til bjarga, á fjall og í grindadráp, fari eg ongantíð at gloyma. Tað sigur 85 ára gamli bretin Douglas Fisher, sum í sekstiárunum var í Føroyum og gjørdi tríggjar dokumentarfilmar um Føroyar fyri m.a. BBC. Miðlahúsið vísir ein av filmunum á ólavsøku**

AFTURLIT
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*




Í dag er hann 85 ára gamal. Men minnini úr Føroyum standa framvegis klár í hugaheimi hansara, hóast yvir 40 ár eru liðin, síðani hann var í Føroyum. Og tá hann umvegis telefonina fær at vita, at eitt føroyskt blað ætlar at vísa ein av hansara filmum á ólavsøku, gerst hann rørdur.

– Tað er kensluborið fyri meg at hoyra, at onkur hyggur at tí, vit løgdu so stóra orku í afturi í sekstiárunum, sigur Douglas Fisher í telefonini úr íbúðini í Norðuronglandi.

### Framhaldsrøð fyri BBC

Filmarnir vórðu gjørdir sum partar av eini framhaldsrøð undir heitinum “Another World” um øðrvísi og mangan avskorin samfeløg. Douglas ferðaðist víða fyri at gera hesar sendingar, og umframt at vera í Føroyum var hann bæði í Afrika og Suðuramerika fyri at gera hesar siðsøguligu og náttúruvísindaligu dokumentarfilmarnar.

Hann hevur gjørt tríggjar filmar um Føroyar, ein fyri BBC og tveir fyri minni lokalar rásir í Onglandi miðskeiðis og seinnapartin í sekstiárunum. Rásir, sum í dag eru keyptar av stóru rásini ITV. Allir vórðu vístir í bretskum sjónvarpi í sekstiárunum, og sambært Douglas eiga allir at finnast á goymslu í dag. Tann fyrsti filmurin ber heitið “Grindaboð” og snýr seg um grindadrápini í sekstiárunum. Tann næsti eitur “Cliffhanger”, har Douglas er við skúvoyingum til bjarga, og tann triði eitur “The Islands in the Clouds”, sum Miðlahúsið vísti seinastu ólavsøku, og sum aftur verður vístur hesa ólavsøkuna.

– Filmurin “Grindaboð” vakti miklan ans í Onglandi og hevur verið nýttur nógv av umhvørvisfelagsskapum sum Greenpeace. At síggja filmar í litum var nýtt tá í tíðini, og alt tað reyða blóðið virkaði ógvusligt fyri onglendingar, minnist Douglas flennandi aftur.

### Ævig minni

Undir upptøkunum til teir tríggjar filmarnar var Douglas saman við einum assistenti ein til tveir mánaðir í Føroyum í trimum umførum, har hann búði í Havn og á Sandoynni hjá privatfólki og eitt skifti á Hafnia í Havn.

- Eg elskaði at koma út í slík øðrvísi samfeløg. Eg knýtti nógv vinabond í Føroyum, sum eg fyrstu árini helt við líka, men við tíðini er tilknýtið til vinfólkini í Føroyum tíverri minkað nógv, sigur Douglas. Hann leggur tó dent á, at minnini úr Føroyum eru ævig.

– At fara til bjarga, á fjall, til útróðrar ella í grindadráp eru upplivingar, eg ongantíð gloymi. Ymsu fólkini, vit búðu hjá í Føroyum, eiga eisini eitt stórt rúm í mínum hjarta, og hyggjandi afturá mína journalistiska yrkisleið eru uppihaldini í Føroyum hæddarpunkt, greiðir Douglas frá.

### Hinir filmarnir á veg

Men Douglas kom ongantíð aftur til Føroya eftir seinasta filmin seint í sekstiárunum, og 85 ára gamli journalisturin sigur seg í dag hava fingið ymisk likamlig brek, sum gera, at hann neyvan kemur aftur til Føroya.

– Men synirnir hjá mær hava báðir ætlanir um at koma til Føroya í nærmastu framtíð. Teir vóru við mær, tá eg gjørdi filmarnar um Føroyar, og teir minnast enn tíðina í Føroyum, greiðir Douglas frá.

Spurdur, um tað ber til at fáa fatur á hinum báðum filmunum, sigur Douglas, at teir skuldu ligið á goymslu hjá BBC og ITV, og at hann gleðiliga skal fara at kanna hetta nærri.

– Eg skal siga tykkum frá, tá eg havi funnið filmarnar, so tit eisini kunnu vísa føroyingum hesar báðar, sigur Douglas Fisher at enda.

Á ólavsøku í fjør vísti Miðlahúsið filmin “The Islands in the Clouds” frá 1966, sum enski journalisturin Douglas Fisher hevur gjørt, og í ár verður sami filmur aftur vístur. Filmurin er ein tíma og verður vístur frá 14 til 20 bæði ólavsøkuaftan, ólavsøkudag og sunnudagin 30. juli. Fisher gjørdi tveir aðrar dokumentarfilmar um Føroya um sama mundið við heitinum “Grindaboð” og “Cliffhanger”, og arbeitt verður nú við at fáa teir til Føroya til sýningar.




# Havnarvág aftur oljudálkað

Aftur í dag varð Havnarvág oljudálkað, tá grønlendski trolarin Mikol L úr Maniitsoq skuldi bunkra olju, varð bunkrað yvir. Kartni Jakobsen sløkkiliðsstjóri sigur við Sosialin, at sambært innsatsleiðaranum fóru út við 200 litrar av dieselolju á sjógv, meðan skipið og Statoil mettu, at talan var um 50-100 litrar dieselolju.

Oljudálkingin hendi um miðdagsleitið og sløkkiliðið var á staðnum stutt eftir og fekk sostatt avmarkað avleiðingarnar fyri umhvørvið. Tó metti sløkkiliðsstjórin hendingina vera sera óhepna, serliga nú ólavsøkan stendur fyri durum.